# kíkin í 1946



*Olaf í Garði Joensen er varamaður á tjóðveldislistanum í Eysturoy*
Mynd: Jens Kristian Vang

# fiskur

**Æti í sjónum**
Løgtingsmaður Sambandsfloksins reisti eisini spurningin, hvussu út hevði sæð í Føroyum eftir loysingina.

– Vit kunnu passandi brúka myndina í fiskivinnubygdini Eiði, nú vit eru her. Eiðisfólk vita, at er nógv æti í sjónum, so verður nógvur fiskur eisini. Hinvegin – er lítið æti, verður lítil og eingin fiskur.

Hann vísti á, at æti hjá fólki vísir seg nú á døgum at vera peningur.

– Er nógvur peningur at fáa, so flokkast fólk til. Tey trívast og fjølgast, og fólkatalið veksur.

Edmund Joensen segði, at størsta og stabilasta "ætið" síðan fólkaatkvøðuna í 1946 er komið úr ríkiskassanum, bæði sum beinleiðis veiting til rakstur av føroyska samfelagnum og sum peningur úr lánigrunnum við uppruna úr ríkiskassanum.

– Sjálvt um føroyingar hava verið óførir – og eru av heimsins bestu sjómonnum, hava strevað og stríðst í fiskivinnu og øðrum vinnum, so hevur í høvuðsheitum helvtin av fruminntøkunum til føroyska búskapin stavað frá ríkiskassanum, segði hann.

Løgtingsmaður Sambandsfloksins helt, at nøgdin av "æti" hevði verið tilsvarandi minni, um loysingin hevði verið fram í 1946.

– Út frá hesum hevði verið lætt at hugsað sær, hvat hevði verið hent, um loysingarfólk fingu sín vilja.

Hann helt, at vit høvdu sæð eina stóra fólkaflyting úr Føroyum til rík økir aðrastaðni við meira "æti".

– Undir kreppuni fyrst í nítiárunum fingu vit ein "forsmakk" upp á, hvussu sárbart føroyska samfelagið er fyri broytingum í "ætinum". Umleið 7000 føroyingar rýmdu úr Føroyum – bara tí, at nøgdin av æti í sjónum sveik, og hetta var, meðan vit fingu somu "ætinøgd" úr ríkiskassanum.

**Hyggja frameftir**
Edmund Joensen helt, at tíðin er komin til, at sambandsfólk og loysingarfólk hugsa meira frameftir og samstarva um at veksa um nøgdina av æti til føroyska samfelagið.

– Seksti ár eru liðin, síðan pólarnir í føroyskum politikki settu spurningin knívskarpt upp, loysing ella samband. Báðir partar vita innast inni, at slíkar stórar avgerðir mugu bara takast, um fólkið stendur aftanfyri, segði løgtingsmaður Sambandsfloksins og løgtingsformaðurin, Edmund Joensen.



*– Stoltleikin gjørdi, at vit tordu at leggja uppaftur meira fyri, og eg minnist, hvussu tað kendist á vera á deksvakt við føroyskum flaggi í toppinum, sum Petur Højgaard tók til*
Mynd: Jens Kr. Vang

# Hønurnar vurpu og kýrnar mjólkaðu hóast føroyingar høvdu valt loysing

**– Tað vísti seg, at alt gekk, sum tað plagdi, bæði tá ið vit vórðu avskornin frá dønum í 1940, og tá ið føroyingar høvdu valt loysing í 1946. Samfelagið var ikki so materialistiskt tá sum í dag, segði Petur Højgaard á 14. Septemberhaldinum á Eiði**

FÓLKAATKVØÐA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Petur Højgaard í Saltangará giftist seks dagar fyri fólkaatkvøðuna í 1946, og herfyri náddi hann eisini aldurin til diamantbrúdleyp.

Petur segði nøkur orð undir 14. Septemberhaldinum á Eiði síðsta hóskvøld.

Hann vísti á, at sambands- og samríkismenn, bæði í 1940 og í 1946, brúktu nógv tíð upp á at fortelja fólki, hvussu bundið føroyska samfelagið var at Danmørkini.

**Øgiligur "skrekkur"**
– Tað var ræðuligt fyri hesi fólk, tá ið sambandið við Danmark varð slitið við týsku hersetingini av Danmark í 1940 – og bretsku hersetingini av Føroyum sama ár. Jú, hetta var ein øgiligur "skrekkur" fyri tey, sum hildu, at vit einki forsmáddu okkum sjálvi.

Men, legði Petur Højgaard aftrat:

– Alt vísti seg at ganga, sum tað plagdi. Hønurnar vurpu, og kýrnar mjólkaðu við sama lag – og torvið fekst til høldar. Tað vísti seg, at alt kom av sær sjálvum. Skipini fóru – og tey flestu komu tíbetur aftur. Fiskaprísurin var góður.

**Kostaði dýrt**
Petur ásannaði, at tá ið samanum kom, kostaði kríggið mongum føroyskum fiskimanni lívið.

– Eg haldi, vit høvdu eini 150 skip, tá ið kríggið byrjaði, og vit mistu eini 20 skip og manningar burtur av. Sjálvur sigldi eg øll stríðsárini, legði hann aftrat.

Hóast kríggið hevði sín prís, var hýrurin góður á fólki.

– Vit komu í eitt viðrák, segði hann.

Petur Højgaard segði, at føroyingar eisini upplivdu nógv "æti", hóast sambandið við Danmark varð slitið í stríðsárunum.

Í frásøgnini á Eiði vísti Petur á ymiskar hendingar, sum honum og øðrum vóru fyri í fiskiskapi undir krígnum, og hann greiddi eisini frá, tá ið ein mina sprongdist undir afturskipinum og søkti skipið, teir vóru við.

**Búnaðist nógv**
Hann helt, at frøroyska sjófólkið búnaðist nógv undir krígnum.

– Vit vóru jú í "eldinum" alla tíðina.

Petur Højgaard segði, at føroyski sjómaðurin ernaðist rættiliga, tá ið teir fingu føroyska flaggið.

– Stoltleikin gjørdi, at vit tá tordu at leggja uppaftur meira fyri, og eg minnist, hvussu tað kendist á vera á deksvakt við føroyskum flaggi í toppinum, sum hann tók til.

Hann greiddi frá, at tað fall honum í lut at gerast ein av skjúttunum umborð.

– Okkum varð álagt, at vit skuldu skjóta, um flogfør nærkaðust, og eg minnist, at hetta var ein ógvuliga spennandi uppgáva at fáa – ikki minst, nú vit sigldu undir føroyskum flaggi. Hetta gav okkum undir givnum umstøðum eina velduga optimismu, og tað var einki við at fara niður við nakkanum, nú vit høvdu fingið okkara egna flagg at verja, segði Petur Højgaard.

**Ivaðist ikki**
Hann segði, at føroysk sjófólk ikki vóru í iva um, at føroyingar fóru at velja loysing.

– Líka so sannførdir, sum vit vóru í hesum, vóru vit harmir, tá ið úrslitið gjørdist so tepurt.

Petur Højgaard helt fyri, at tað vóru danir og føroyskir undanstøkkingar, sum saboteraðu fólkaatkvøðuna í 1946.

– Seinni fingu sambandsmenninir vald, og tá fóru teir at keypa gamlar trolarar, sum vórðu keyptir undir ongum eftirliti. Men teir kendu jú onga ábyrgd fyri hesum landi, og tí var einki annað væntandi, segði Petur Højgaard á 14. Septemberhaldinum á Eiði.